Loyvisnevndin fund mánadagin:

Nýggj skeinkiloyvi í næsta mánað

Eini fimm-seks nýggj skeinkiloyvi eru tøk í Havnar Kommunu at søkja. Umsøkjarar kunnu vænta sær svar í næstum, men sokallað klubbaloyvi verða ikki latin longur, sigur Rúni Joensne, formaður í loyvisnevndini

DAGNY JOENSEN

Seinast í august gav landsstýrismaðurin í vinnumálum tilmæli til loyvisnevndina at hækka talið av skeinkiloyvum í Havn.


Loyvisnevndin hevur fund mánadagin, og skal taka støðu til umsóknirnar.

Formaðurin í loyvisnevndini veit ikki rættiliga, hvussu nógvar umsóknir eru komnar, av tí at nakrar umsóknir verða sendar í Tinganes, meðan aðrar verða sendar beinleiðis til løgregluna. Tað er løgreglan sum fyrireikar málið til loyvisnevndina at taka støðu til.

Drúgv kanning áðrenn loyvi verða latin

– Vit fara at taka støðu til umsóknirnar mánadagin, men væntandi verður ikki, nakað loyvi latið fyrr enn um mánað. Tað kemst av, at nógvar kanningar skulu gerast, áðrenn loyvi verða latin, sigur Rúni Joensen, deildarstjóri á lógadeildini í Tinganesi.

Hóast broytingar ikki eru gjørdar í lógini, fáa bert matstovur skeinkiloyvi. Tað merkir, at sokallað klubbaloyvini fella burtur, um klubbar gevast at virka.



Eini fimm-seks skeinkiloyvi er tøk at søkja í Havn, og loyvisnevndin fer mánadagin at taka støðu til umsóknirnar. Væntandi tekur tað eina mánað at fáa loyvini avgreidd

Ongir nýggir klubbar

Tá nýggja rúsdrekkalógin varð sett í gildi, fingu klubbarnir, sum áður vóru ólógligir, loyvi at skeinkja brennivín, øl og vín, og vórðu hervið gjørdir lógligir.

Fleiri klubbar eru seinastu árini givnir við hesum virksemi, og tey loyvini sum vóru, eru strikað.

Klubbarnir, sum ikki longur eru til eru: Fuglafjarðar klubbi, Vágs klubbi og Kvøldlot.

– Lógin sigur, at klubbaloyvini detta burtur, um teir gevast at virka, og at loyvi at hesum slag ikki verða latin aftur. Bert matstovuloyvi verða hereftir latin, sigur Rúni Joensen.

Finnbogi Arge, landsstýrismaður:

Danir sinnaðir fyri at fáa heildarloysn

– Tað, at flogvallarmálið varð tikið upp í samrøðunum millum forsætisráðharran og løgmann, er tekin um at báðir partar vilja hava loysn í málinum, sigur landsstýrismaðurin

DAGNY JOENSEN

Eitt ítøkiligt úrslit kemur kanska burturúr samrøðunum millum Nyrup Rasmussen, forsætisráðharra og Anfinn Kallsverg, løgmann, í flogvallarmálinum.

Málið um at leingja flogvøllin hevur verið frammi av og á seinastu árini, men einki er spurt burturúr.

Støða er kortini ikki tikin til, hvat skal gerast, men løgmaður fekk kortini sagt forsætisráðharranum, hvørji ynskini hjá føroyingum eru.

Tryggja flogferðsluna

Eitt nú at neyðugt er at leingja flogvøllin og gera glíðibreyt, fyri at tryggja flogferðsluna.

Danir umsita flogvøllin, men teir eru sinnaðir at fáa føroyingar at yvirtaka.

Trupulleikin er, at flogvøllurin árliga hevur 8 - 9 mió. krónur hall, og at Landsstýrið ikki eru hugað at yvirtaka mál, sum geva undirskot.

Í summar var Finnbogi Arge í Danmark og tosaði við Sonju Mikkelsen, ferðslumálaráðharra um flogvøllin, har hann greiddi frá sínum sjónarmiðunum viðvíkjandi flogvallarmálinum.

Umsitingin í Danmark og Føroyum kanna

Á vitjanini hjá forsætisráðharranum í Tinganesi, varð avgjørt, at embætisfólk í donsku og føroysku umsitingini skulu kanna málið. Ein fundur verður seinni í ár, har fólk frá Ferðaslumálaráðnum og Vinnumálastýrinum skulu tosa saman .

Landsstýrið hevur fingið tilfar til vega um flogvøllin frá Ferðslumálaráðnum. Tað verður nú sundurgreinað og síðani verður tosað við Ferðalumálaráðið.

– Danir vilja sleppa av við flogvøllin, og vit mugu royna at fáa semju um, hvussu tað skal gerast, sigur Finnbogi Arge.

Spurningur um hall

– Hava tit tosað um, møguliga at fáa undirskotið burtur?

– Málið skal kannast áðrenn vit koma so langt. Um vit skulu yvirtaka undirskotið, er tað ein fíggjarlig byrða, sum vit ikki hava í dag, og sum mugu vit taka hædd fyri.

– Tað, at danir vilja hava eina heildarloysn, merkir, at teir vilja sleppa av við flogvøllin.

– Tað er í lagi, um vit fáa røttu avtaluna og endurgjald fyri undirskotið, sigur landsstýrismaðurin.

Hann heldur, at tá málið er tikið upp millum løgmann og forsætisráðharran, so er tað tekin um, at áhugi er fyri at fáa einaloysn í málinum.



Danska ferðslumálaráðið vil sleppa av við flogvøllin í Vágum sum liggur á 8-9 nió. krónur hall. Trupulleikin er at landsstýrið ikki vil yvirtaka mál, sum gevur hall

NOA NOA® NOA NOA®
"HINUMEGIN VEGIN"
REST-SØLA
Alt skal ÚT!
29
NOA NOA®
Bumull 49,-
Alt annað 99,-
BROR &SØSTER
99,-
29
SHAKE
299,-
í Tróndargøtu
tlf. 318200